# Skakandi tilburðir

Í triðju bókini Skakandi tilburðir eru 13 frásagnir frá álvarsomum hendingum. Frásagnirnar eru lýstar við litmyndum og tekningum, soleiðis at lesarin kann liva seg inn í søguna. Søgur eru millum annað um skúvoying sum lá óvanliga leingi á botninum í svimjihyli og bleiv kendur allan læknaheimin; frásøgn um Sigmund Andreassen sum bleiv hildin fangi á oynni Réunion í 9 mánaðir; svínoying, sum fekk 380 volt ígjøgnum seg, smádrong úr Miðvági sum bjargaði restina av familjuni úr brennandi húsum og aðrar skelkandi hendingar. Tað er forlagið Føroya Met, sum gevur út Skakandi tilburðir




# Minnisrit um KJ Hydraulik

Í sambandi við at 30 ár eru síðani virkið KJ Hydraulik varð sett á stovn, hevur Lillian í Lambanum skrivað minnisrit um virkið og stovnaran Kára Johannesen. Minnisritið, ið hevur heitið „Hugur og hegni“, er skipað í tíðarrøð, har fyrri parturin er ein lýsing av lívinum hjá Kára Johannesen, sum doyði bert 52 ára gamal. Seinni parturin av bókini lýsir virkið KJ Hydraulik, sum í fleiri mátar var lívsverkið hjá Kára Johannesen. Bókin verður løgd fram í dag klokkan 14 í niðaru lon hjá KJ Hydraulik á Kambsdali




# Útisetalív á donskum

**Sjálvævisøgan hjá Marionnu Debes *Úti á leysum oyggjum* er nú týdd til danskt**

TÝÐING
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

12 ár gomul flytir Marianna úr Føroyum til Danmarkar, har hon skal ganga á Maria Mørk kostskúlanum í Hillerød.

Harvið byrjar lívið sum útseti og ein støðug ferðing aftur og fram millum Danmark og Føroyar, eins og nógvir føroyingar kenna tað. Tað sermerkta er tó, at Marianna bara er 12 ára gomul, tá hon flytir. Orsøkin er, at báðir hennara eldru beiggjar lesa í Keypmannahavn. Uttan beiggjarnar vil Marianna ikki verða eftir í barnaheiminum, har hon á ongan hátt kennir seg trygga.

### Upp um tað persónliga

Bókin, sum á donskum hevur fingið heitið *Der hvor øerne giver slip*, byggir á minnir og hendingar, ið onnur børn eins væl kundu havt upplivað. Í so máta roynir bókin at lyfta seg upp um tað persónliga. Eisini tá sjónarhornið verður flutt til mammuna, pápan ella onnur í familjuni.

Hóast Marianna trívist væl í Danmark, hvørvir longsulin eftir barndómslandinum ongantíð. Á tann hátt kann heitið á bókini *Der hvor øerne giver slip* fatast sum bæði ein frígering og benda á longsul og ótryggleika.

Sum Guðrun Gaard, ummælari, hevur víst á, kann heitið eisini tulkast sum, at høvundurin nú er vorðin ein eygleiðari, sum stendur og hyggur at, hvussu leikur fer.

Sum árini millum barndómin og nútíðina eru liðin, hevur unga kvinnan ment vaksna tilvitið, sum skal til, fyri at tulka tað, sum hendir barninum.

Tað er Marianna Debes sjálv, sum hevur týtt bókina til danskt.

Forlagið Arvids gevur út.




*Heitið á bókini ”Der hvor øerne giver slip” kann bæði fatast sum ein frígering frá heimlandinum ella benda á ein nýggjan ræðandi ótryggleika*

# Journalistar á ferð í NORA-økinum

***Nordatlantens ansigter* er heitið á nýggjari bók frá NORA, har fýra journalistar skriva sína persónligu frásøgn frá teimum fýra limalondunum í Norrøna Atlantssamstarvinum**

ÚTGÁVA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Teir fýra journalistarnir hava allir verið gestir í landinum, sum teir hava vitjað. Sum ferðandi frá einum av hinum londunum í NORA-økinum, hava teir ikki bara eygleitt tað, sum er fremmant og annarleiðis, tað eksotiska. Tey hava eisini hugt eftir og lagt merki til tað, sum er felags fyri londini, tað sum ger at Grønland, Ísland, Føroyar og Strandarnoregi eru ein felags región.

### Persónligar frásagnir

Úr Føroyum er útvarpsmaðurin Høgni Djurhuus farin á ferð til Noregs, hann hevur á sín egna sermerkta hátt skrivað um lívið í Norðurnoregi. Íslendska Bjørg Eva Erlendsdóttir hevur verið í Føroyum, norski Magne Kveseth í Grønlandi og grønlendska Mariia Simonsen hevur verið í Íslandi.

*Nordatlantens ansigter* leitar ikki eftir norðuratlantisku sálini ella eftir kjarnuni í samleikanum í økinum. Frá byrjan hava journalistarnir havt frælsi sjálvir at




*Í bókini „Nordatlantens ansigter“ prátar íslendskur journalistur*

velja fólk at tosa við og skriva tekstin á sín egna persónliga hátt.

### Ein región

Uppgávan hjá NORA er millum annað at styrkja samstarvið millum Grønland, Ísland, Føroyar og Strandarnoregi um felags avbjóðingar.

Víðsjónin í samstarvinum er, at tey fýra londini tilsamans eru ein región, tí tey hava nógv felags viðurskifti og fleiri felags avbjóðingar. Til dømis, tá ið hugsað verður um arbeiðs- og lívsviðurskifti í norðuratlantisku strandarsamfeløgunum, gagnnýtslu av havtilfeinginum og náttúruviðurskiftini, sum á so mangan hátt eru eins.

Tað eru ikki bara felags politisk og fíggjarliga áhugamál, sum skapa eina región.. Ein región eru eisini tey fólk, sum búgva og liva har. Ein región er eisini mentan, sjálvsfatan og hugsanir hjá teimum sum búleikast í økinum.

Við nýggju bókini vónar NORA, at lesararnir, sum fara við á ferð saman við journalistunum, eisini hugsa um Grønland, Ísland, Føroyar og Strandarnoregi sum eina región – teirra región.

*Nordatlantens ansigter* er 150 blaðsíður og fæst í bókasølunum

# Fjøltáttað Fróðskaparrit

**Nýggja Fróðskaparritið kemur víða um í sjey hugvísundaligum og tveimum náttúruvísundaligum greinum**

ÚTGÁVA

Aftur í ár hevur Majbritt Pauladóttir eina grein, ið nevnist *Skiftismæli í føroyskum?* Hetta er forvitnislig grein, ið byggir á masterútbúgving hennara.

Hjalmar P. Pedersen hevur skrivað fleiri nýskapandi ástøðiligar greinar um mál í Fróðskaparrit, og hesaferð snýr greinin seg um *Lánistigan og danskt í føroyskum.*

Í bók 56 hevur Eivind Weyhe tvær greinir, ið umrøða staðarnøvn. Hvat er rætta navnið: *Akrar ella Agrar?* Og *Skúvanes, Skúvisnøs, Nøsin* ella *Vesturi í Nøs?*

### Prestar og kvæði

*Trý kvæði eftir Jens Hendrik Djurhuus* verða greinað av Maluni Marnersdóttir. Talan er um kvæðini: ”Eirikur og Rollur”, ”Rodmunds kvæði” og Gøtuskeggjar”, ið verða lýst í einum søguligum ljósi.




*Nýggja Fróðskaparritið er nummar 56 í røðini*

Povl Skårup hevur hesaferð skrivað um *Christen Djurhuus' færøske præstetal (1759),* ið siga frá prestum í teimum sjey prestugjøldunum við støði í tilfari hjá rektaranum við latínskúlan í Havn. Eisini inniheldur greinin nøkur prestuvísar.

*Pappírsbátur í ringum sjógvi* er áhugaverd grein, ið Bergur Rønne Moberg hevur skrivað um heterotopia í skaldsøguni Barbara hjá Jørgen-Frantz Jacobsen.

### Kombikk og Eiði-2

Ein verkætlan um kombikk varð gjørd árini 2002-04, og í hesum sambandi kemur greinin *Sníkar í føroyskum kombikki, Gasterosteus aculeatus L,* ið Dánjal Petur Højgaard, Petur Steingrund and Glenn Bristow hava skrivað.

Náttúrugripasavnið hevur kannað Útnyrðingseysturoy í sambandi við Eiði-2-ætlanini hjá SEV. Greinin *Útbreiðsla av svartaklukkum (Coleoptera, Carabidae) í Útnyrðingseysturoy og hvussu ávirkast hon av avveiting,* skrivað av William Simonsen, Anna Maria Fossaa, Erla Olsen og Jana Mikkelsen, er eitt úrslit av hesum arbeiði.

### Yvirlit og ritstjórn

Eins og í Fróðskaparritum frammanundan verða tey nevnd, ið hava fingið doktaraheiti í 2007 (Nýtt innan vísindi í 2007). Eisini er yvirlit yvir tað, sum granskarar innan- og uttanlands hava útint av vísindaligum avrikum av ymsum slag um føroysk viðurskifti í 2007 (Vísindaritverk 2007).

Fróðskaparrit hevur síðan 2006 havt Firouz Gaini sum ritstjóra saman við Dorete Bloch, ið hevur ritstjórnað síðan 1994. Firouz Gaini tekur sær av hugvísindum og Dorete Bloch av náttúruvísindum.

Fróðskaparrit verður útgivið av forlagnum Fróðskapi, Faroe University Press.

-ave-